

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 12 - 2011

# Skal vera lætt at búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands

Skulu vit halda fólkatalinum í Føroyum, fyri ikki at tala um fáa fólkavøkstur, so mugu vit gera tað lætt at búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands. Har er eingin vegur uttanum, segði Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum m.a., tá hann sum gestarøðari á Vinnuháskúlanum núum dagarnar vendi sær til nýklæktu maskinmeistararnar, skipararnar og skipsførararnar. Vit tríva í nakað av tí sum hann hevði at siga eisini til politikararnar í Føroyum. Søgan og havið Vit føroyingar eru ein oyggjatjóð. Tað hevur altíð gjørt okkum útatlítandi. Havið er ongantíð langt burturi hjá einum føroyingi, óansæð hvat hann tekst við ella hvat starv hann hevur. Okkara søga er neyvt samantvinnað við havið. Okkara forfedrar komu sjóvegis, og fundamentið undir føroyska vælferðarsamfelagnum er havið, um vit vilja tað ella ei. Tað verður so nógv tosað um vitan og vitanarvinnur í hesum døgum. Vit skulu dúva uppá vitanarvinnur her í Føroyum í framtíðini, verður sagt. Skilagóð orð. Skilagóð ynski. Men hvat merkir tað? Hvørjar vinnugreinar kunnu vit vísa fram, har vit veruliga kunnu siga, at her er ein føroysk vitanarvinna? KT? Løgfrøði? Samfelagsfrøði? Almenna umsiting? Neyvan. Skal man tosa um vitanarvinnu, sum skal hava nakran verðsins kjans at gera mun, so má talan vera um okkurt, sum vit duga væl, og sum onkur uttanfyri Føroyar eftirspyr. Tað má vera servitan innan eina vinnugrein, har vit standa okkum væl í heimshøpi. Hvør vinna passar til hasa lýsingina í dag? Tað ger sjóvinnan. Tit, sum sita inni her, umboða eina føroyska vitanarvinnu. Tit umboða eina vinnu, har vit veruliga kunnu siga, at hetta duga føroyingar betri enn tey flestu. Vit kunnu halda høvdið høgt og siga, at føroyskir yvirmenn verða nógv eftirspurdir og teljast millum heimsins frægastu. Eitt er bókligi og praktiski førleikin, sum tit nú standa við. Eitt annað, sum føroyingar altíð fáa rós fyri er arbeiðsmoralurin. Tìbetur hava vit enn í Føroyum ein arbeiðsmoral, har man ger sítt besta, og

setur eina æru í at gera tingini ordiligt. Man er ikki smáligur. Ein, sum eg kenni væl var stýrimaður á einum donskum supplyskipi. Á veg upp á brúnna kemur hann á ein enda, sum liggur og rekst á dekkinum. Hann tekur endan upp, kveylar hann saman og leggur hann til síðis, so eingin dettur um hann. Tá hann kom uppá brúnna sigur danski stýrimaðurin, sum hann skuldi avloysa, at hann skuldi ikki taka ein enda upp á dekkinum, tí at tað var arbeiðið hjá dekkarunum. Føroyski stýrimaðurin var sum skilligt er ovfarin av, at tann danski kundi funnið uppá at gleiva uppum endan á ekkinum uttan at taka hann upp, tí at tað ikki var hansara arbeiði. Nú skal eg slett ikki skera danskar yvirmenn um ein kamb, men handa søgan lýsir nokkso væl, hvør munurin er á einum sjómanni, sum setur eina æru í sítt starv, og so ein persón sum hugsar sum ein smáttskorin funktionerur. At búgva í Føroyum krevur, at man er mobilur og fleksibul. Føroyar er eitt oyggjaland, og tað krevur, at vit laga okkum hareftir. Kanska er tað tí, at føroyingar duga so væl. At føroyingar eru eftirspurdir sæst hvønn dag. So seint sum í dag kunnu vit lesa á oljan.fo, at Bourbon Offshore hevur verið í Føroyum, tí felagið leitar eftir føroyskum sjófólki at manna skipini. Sum er eru hundraðtals føroyingar í sigling kring allan knøttin. Ikki minst í tí vinnuni, sum eg fáist við  oljuvinnuni. Kenna Føroyar vegna dugnaskap Eg var í Cairo í Egyptalandi fyri nøkrum árum síðani, har eg skuldi á fund fyri mín fyrrverandi arbeiðsgevara Hess Corporation  ella Amerada Hess, sum tað fyrr æt. Vit skuldu skjóta 3D seismikk á einum loyvi, sum vit høvdu í Reyðahavinum og høvdu fund við okkara kontraktsfólk. Meðan vit sita á fundi, so spyr ein breti, hvaðan eg eri hann hoyrdi, at eg hevði onkra løgna dialekt. Eg sigi so, at eg eri úr Føroyum, og gjørdi meg kláran til, sum vant, at forklára hvar tað var. Men tað gjørdist ikki neyðugt, tí tað visti hann alt um. Hann fortaldi mær, at chase báturin hjá seismikkskipinum, sum skjeyt í Reyðahavinum var føroyskur við føroyskari manning. Tá vísti tað seg, at tað var eitt skip hjá Thor. Verðin er lítil. Tað, sum fløvaði uppaftur meir tá, var, at Thor fekk sera gott skoðsmál frá Western Geco, sum skjeyt seismikkin. Tað er ótruliga stórur munur á, hvussu nógvir føroyingar í dag starvast í oljuvinnuni í mun til fyri 15 árum síðani, tá eg byrjaði. Gamaní vóru nakrir, sum eitt nú sigldu við supply-skipum og onkur var á palli, men í dag er hetta tal eksploderað, soleiðis, at vit tosa um fleiri hundrað fólk bæði á landi og sjógvi. Oljuvinnan er ein av teimum vinnum, sum gevur nógv til føroyska samfelagið. Um onkur er, sum hugsar um at fara oljuvegin, so eru míni ráð, at man innstillar seg uppá at kunna virka um allan heimin. Skuldi tað gleðiliga hent, at ein oljuvinna veruliga tók dik á seg í Føroyum, so kann man altíð arbeiða her tá, men sum útgangsstøði, so er eitt lív í oljvinnuni fyri tað mesta eitt lív, har man virkar um allan heimin. Tá heimurin er títt arbeiðspláss, so kanst tú búgva hvar sum helst, og hvar finnur man tryggari rammur fyri familju ella ein betri livimáta enn í Føroyum? Tit, sum sita her, eru partur av einari altjóða arbeiðsmegi, sum er nógv eftirspurd. Framtíðar føroyska arbeiðsmegin eigur at verða ein altjóða arbeiðsmegi, sum er mobil og fleksibul. Næstan alt, sum føroyingar keypa og brúka, verður innflutt. Hóast búskaparfrøðingar  og eg sjálvur teljist ímillum slíkar - mangan tosa sum um, at vit kunnu liva av at klippa hvørjum øðrum, ella fær man

fatan av í hesum døgum, umsita hvønn annan, so sleppst ikki undan til sera einfalda prinsippinum, at fyri at kunna hava innflutning, so má man hava útflutning. Valuta má koma inn í landið, fyri at vit kunnu senda valuta av landinum til innfluttar vørur og tænastur. Kunnu ikki vera útisiglarar fyriuttan Okkara útflutningur kemur fyrst og fremst frá fiski- og alivinnuni, men so koma tykkara fakbólkar. Útisiglarar er útflutningur av vitan. Teir pengar, sum koma inn í landið frá einum alsamt vaksandi bólki av útisiglarum, kunnu vit ikki vera fyri uttan. Akkurát hvussu nógvar milliónir koma inn í føroyska búskapin er ikki greitt, men tað hevur sera stóran týdning. Skal okkum vera lív lagað í framtíðini, so má tað vera lætt at búgva í Føroyum og arbeiða aðrastaðni. Tíverri tykist tað sum um, at myndugleikarnir ikki deila hesa áskoðan. Vit gera tað alt meira torfort at búgva í Føroyum og arbeiða aðrastaðnis. Tað tykist sum almenni politikkur Føroya er, at eingin skal forvinna sær til dagin og vegin uttanlands. Eitt dømi um hetta er, hvussu tvørligt tað er við ferðing til og frá arbeiðsplássi. Føroysku myndugleikarnir leggja umsettar danskar reglar fyri dagin, sum um at vit vóru eitt land í somu støðu sum Danmark. Tað eru vit ikki. Um vit vilja tað ella ikki, so eru Føroyar ein útjaðari, og okkara bjarging liggur í at hava eina arbeiðsmegi og - hesi fylgjast at við tíðini  eina vinnu, sum virkar um allan heim. Hetta eigur at verða viðurkent frá almennari síðu, og almennar skipanir eiga at tillagast hareftir. Skulu vit halda fólkatalinum í Føroyum, fyri ikki at tala um fáa fólkavøkstur, so mugu vit gera tað lætt at búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands. Har er eingin vegur uttanum. Føroysku myndugleikarnir mugu gevast at hugsa sum centralistiskur miðstaður, har man fær meira umsiting av øllum møguligum slag fyri hvønn dag sum fer og byrja at hugsa sum eitt land, sum dúvar uppá, at heimurin liggur opin fyri føroyingin at virka í. Myndir - Fra hatiðarhaldinum a Vinnuhaskulanum i farnu vikur, ta progv vorðu handað. Ben Arabo var gestarøðari. Hann er stjori i Atlantic Petroleum. Myndatøka -  oljan.fo/Jan Müller